

*Íslendingar og føroyingar ganga nú saman um at hjálpa børnum í øðrum londum umvegis ABC Barnahjálpina. Í føroysku fyribilsnevndina vórðu hesi vald Karsten Hansen, Rúna Sivertsen og Hjørdis Háberg Petersen. Uttast vinstrumegin stendur íslendski leiðarin í ABC Barnahjálpini, Guðrún Margrét Pálsdóttir*

# Kunnu hjálpa børnum kring allan heimin

**Fyri 18 árum síðani varð íslendska barnahjálpin ABC sett á stovn. Nú er ætlanin at henda kristna barnahjálpin somuleiðis skal byrja í Føroyum**

BARNAHJÁLP
*Orð og mynd: Snorri Brend*

**Havn:** Á fundi leygardagin vóru fyrstu stigini til eina føroyska deild av hesum felagsskapinum, sum serliga virkar í Afrika, Indien, Filipsoyggjunum og í Pakistan.

Á kunnandi fundi greiddi leiðarin í íslendsku hjálpini, Guðrún Margrét Pálsdóttir frá arbeiði teirra. Hennara áheitan á teir innbodnu luttakararnar var at fáa skipaða eina nevnd sum kundi føra arbeiðið víðari.

Fundurin valdi so eina fyribils nevnd, sum skal arbeiða víðari við ætlanini. Miðað verður eftir at fáa eina sjeymanna nevnd við breiðari umboðan úr ymiskum kirkjum og samkomum.

Í fyrstu fyribilsnevndina valdi fundurin Rúnu Sivertsen, Karsten Hansen og Hjørdis Háberg Petersen.

### Geva víðari

Tey fara nú at arbeiða víðari við at fáa felagið stovnað, samstundis sum støða skal takast til, hvat land føroyingar serstakliga ætla at stuðla í framtíðini. Óhugsandi er ikki, at talan verður um okkurt afrikanskt land.

Ein máti at stuðla verður við faddraskapum, og her vóna fyrireikararnir at fólk fegin vilja taka undir við hesum arbeiðinum, sum m.a. arbeiðir við undirvísing, læknahjálp og bústøðum. Bara í ár hevur íslendska ABC Barnahjálpin bygt tríggjar skúlar í Pakistan og ein í Uganda.

- Vit føroyingar hava verið so ríkiliga vælsignaðir við øllum góðum. Nú fáa vit ein møguleika at geva øðrum lut í hesi signingini.

- Á henda hátt fáa vit víst børnum kring allan heimin, at tað er ein Gud á himli, sum eisini elskar tey, og at tað er ein vón fyri framtíðina, sigur Hjørdis.

# Ein fløga úr hjartanum

**- Eg vóni, at henda fløgan verður til gleði og uppbygging fyri tey sum lurta eftir henni, sigur Eyðun Jacobsen.**
**Í hesum døgum hevur hann givið út sína fyrstu fløgu "Ein undurkelda" við íalt 12 løgum.**

FLØGUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fløga:** Tað hevur leingi ligið Eyðuni á hjarta at geva út eina fløgu. Ikki fyrrenn nú, vit skriva november 2006 eydnaðist tað so.

Fløgan er hinvegin vorðin til og búnað í hjarta hansara gjøgnum hesa tíðina, soleiðis at hann í dag stutt kann siga um hana:

- Henda fløgan er sum eitt hjartabarn fyri meg!

Fløgan er føroysk burturav, um vit líka síggja burturfrá botninum í henni: Vælspælandi svenska trummuleikaranum Klas Anderhell.

Umframt svian eru bert føroyskir tónleikarar, kórsangarar og tøkningar við.

### Føroysk framleiðsla

Á fløguni eru fyri tað mesta gamlir og kendir sangir, sum nógv eru sungnir í samkomunum kring landið.

- Hetta eru eisini sangir, sum eg eri uppvaksin við og havi sungið gjøgnum øll barnaárini, sigur Eyðun.



*Fløgan hjá Eyðuni Jacobsen hevur verið leingi ávegis. Nú hon er útgivin er eisini sálin við í henni*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Á fløguni kann hann tí eisini av hjarta takka móður síni, fyri at hon frá barnsbeini av lærdi hann at syngja.

Við hesum 12 sangunum á fløguni vónar hann eisini, at áhoyrarin fær eyga á tað sama sum hann, nevniliga ta ævigu kelduna sum rann frá krossinum á Golgata.

Tá ein tosar við og um Eyðun, so er eitt sum altíð sermerkir prátið: Hansara stóri áhugi fyri tónleiki og sangi.

- Eg havi altíð havt áhuga fyri tónleiki. Eg havi í roynd og veru spælt síðani eg var 12 ára gamal, sigur Eyðun.

Hann hevur verið við í fleiri útgávum áður við til dømis kasettubondum, men hetta er fyrstu ferð hann einsamallur gevur eina fløgu út.

### Sálin er við

Tað er ikki frítt, at hann er nøgdur við úrslitið. Tað hevur tikið sína tíð, men tað hevur verið stríðið vert.

- Eg vil bara siga, at Kristoffur Mørkøre, sum hevur tikið hana upp, hevur gjørt eitt ómetaliga stórt arbeiði.

- Hann hevur dugað heilt ótrúliga væl at fáa tað rætta fram, - tað sum veruliga býr í mínum hjarta. Tí kann eg bara siga, at sálin er við í øllum sangunum, sigur Eyðun.

Tað er kortini ikki bert Eyðun sum syngur á fløguni. Sjálvur syngur hann níggju av sangunum, meðan tríggjar av døtrum hansara syngja hvør sín sang.